## UMSÓKNARBLAÐ

Umsóknarblað til tænastu, er á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

Í umsókníni gevur borgarin loyvi til eitt sjálvvirkandi gjald av tænastuni.

Umsóknarblaðið skal sendast til Heilsuhúsið, heilsuhusid@torshavn.fo ella til:

**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 3099 • FO-110 Tórshavn


TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Heilsu- og umsorganartænastan**
Postboks 3099 • FO-110 Tórshavn
Teldupost: heilsuhusid@torshavn.fo

**Umsókn um mattænastu**

1 Umsøkjari
Navn:
Bústaður:
Postnr. og býur/bygd:
Føðingardagur:
Telefon/fartelefon:
Teldupostur:

2 Viðkomandi viðurskifti (set x)
Fólkapensjonist
Fær heimahjálp
Minnisveik/-ur

3 Avvarðandi:
Navn:
Telefon / fartelefon:

4 Ynski (set x)
mánadag · týsdag · mikudag · hósdag · fríggjadag · leygardag
vanligan kost · diabetes kost · serligan kost *

MAI 2019

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Mattænasta

## – døgurði heim til fólkapensjonistar


**Tórshavnar kommuna**
Postsmoga 32 · FO-110 Tórshavn
Telefon 302010 · torshavn@torshavn.fo


| | |
|---|---|
| Mánadag-hósdag | kl. 9-16 |
| Fríggjadag | kl. 9-15 |



torshavn.fo

## MIÐVÍS UMSORGAN

Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.

Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.



# Mattænasta

– døgurði heim til fólkapensjonistar

**Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavnar kommunu veitir mattænastu, í styttri ella longri tíðarskeið, til ávísar fólkapensjonistar, ið búgva í egnum heimi.**

Í mattænastuni hjá heilsu- og umsorganartænastuni, fáa tygum góðan kost, ið er av alstórum týdningi fyri heilsu og vælveru. Endamálið er at tryggja gott føðslustøði og stimbra vælveruna og lívsgóðskuna hjá borgaranum.

## HVØR KANN FÁA MATTÆNASTU

Fyrst og fremst heimabúgvandi fólkapensjonistar, ið ikki megna at gera døgurða.

Í serligum føri kann tænastan veitast borgarum undir 67, sum búgva í egnum heimi.

Avgerð um at veita hesa tænastu verður tikin við støði í einari fakligari meting.

## ÚTKOYRING

Døgurðin kann koyrast heim til tygara allar yrkadagar. Tygum ráða yvir hvussu nógvar dagar um vikuna tygum vilja hava døgurða. Og um tygum ynskja heilan ella trýkvartan verður.

Neyðugt er at bilførarin far lati tygum matin, ið beinanvegin skal í kuldaskáp.

Eru tygum ikki inni, tá døgurðin kemur, kann útberarin seta seg í samband við avvarðandi.

## AVBOÐ

Vilja tygum geva avboð, sigið vinarliga frá helst tríggjar yrkadagar undan á tlf. 356781, millum kl. 8 og 14. Somuleiðis við tilmeldan aftur.

**TALAN ER UM SERSTAKA TÆNASTU, OG SKAL BORGARIN SØKJA UM TÆNASTUNUVEITINGINA**

## DØGURÐIN SKAL HITAST

Døgurðin er liðugur, men kaldur og skal standa í kuldaskápi til hann skal hitast og etast. Hita døgurðan, ið er merktur ● REYTT, við 150 stigum í 45 min., í ílatinum við lokinum á. Ella í mikroovni 3-5 min.

Matur merktur ● BLÁTT skal ikki hitast, men etast kaldur.

## SERLIGUR KOSTUR

Tørvar tygum serligan kost, vegna sjúku ella annað, er neyðugt við læknaváttan.

**EIN KANN FÁA MAT HVØNN DAG ELLA EFTIR TØRVI. TAÐ KANN VERA EITT STYTTRI TÍÐARSKEIÐ ELLA YVIR LONGRI TÍÐ.**

## MATARSKRÁ

Tygum fáa sendandi matskrá 2. hvørja viku.

## KOSTNAÐUR OG GJALDSTREYTIR

Heilur (1/1) døgurði kostar 50 kr.
Tríkvart (3/4) døgurði kostar 45 kr.

Gjaldast kann bert umvegis peningastovn, har tygum lata peningastovnin sjálvvirkandi gjalda upphæddina fyri mánaðarligu uppgerðina.